**Joen Magnus Rasmussen**
**vegna Fólkaflokkin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 19/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)** (Skattafríar gávur)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)**
(Skattafríar gávur)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 169 frá 20. desember 2017, verður gjørd henda broyting:

**1.** Í § 29 verður sum nr. 31 sett:

"31) gávur millum likamligar persónar upp til kr. 5.000 árliga. Tó kann hin skattskyldugi í mesta lagi fáa skattafríar gávur upp á íalt kr. 30.000 árliga."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

Endamálið við uppskotinum er, at ein og hvør, sum fær eina gávu, sum er kr. 5.000,00 ella minni, skal sleppa undan at gjalda skatt av hesi gávu.
Eingin kann fáa meira enn kr. 5.000,00 skattafríar frá sama gevara í einum ári. Heldur ikki kann samlaða upphæddin av skattafríum gávum fara upp um kr. 30.000,00 í einum ári.
Við tað at uppskotið einans fevnir um gávur frá likamligum persónum, er talan um pening, sum longu er skattaður einaferð.

**Galdandi lóggáva**

Gávur eru vanliga skattskyldugar. Í skattalógini eru tó serligar ásetingar um gávur millum familjulimir (sí § 29, nr. 3). Eisini eru reglur um gávur frá innsavnan (sí § 29, nr. 17) umframt rundskriv um gávur frá arbeiðsgevara.
Eftir galdandi lóggávu kann ein gáva, í stóran mun, enda í landskassanum, hóast hon varð ætlað til hjálp hjá einum, ið hevur tørv á henni.
Av tí at gávur skulu leggjast afturat skattskyldugu inntøkuni, verða tær altíð "toppskattaðar".

**Ætlanin**

Hóast trygd ikki kann fáast fyri tí, eru sannlíkindini stór fyri, at tað verður tann, sum hevur meira, sum fer at geva tí, sum hevur minni. Hetta er í øllum førum ætlanin við uppskotinum, soleiðis at tann, sum hevur meira, skal kunna geva tí, sum hevur minni uttan at blanda landskassan uppí.

**Kapittul 2. Avleiðingar av uppskotinum**

1. **Fíggjarligar avleiðingar**

**Fyri land og kommunur**
Roknað verður ikki við stórvegis fíggjarligum avleiðingum fyri land og kommunur.
TAKS hevur upplýst, at upplýsingar um inntøkur eru ikki útgreinaðar soleiðis, at tað ber til at siga, hvørjar fíggjarligu avleiðingarnar høvdu verið av slíkari skattafrítøku.

**Fyri ávís øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávís øki í landinum.

**Fyri ávísar samfelagsbólkar/felagsskapir**
Uppskotið hevur væntandi positiva fíggjarliga og sosiala avleiðing fyri teir samfelagsbólkar, sum ikki eru so væl fyri fíggjarliga.

**Fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2. **Umsitingarligar avleiðingar**
   Uppskotið hevur ikki stórvegis umsitingarligar avleiðingar.

3. **Umhvørvisavleiðingar**
   Uppskotið hevur ikki umhvørvisligar avleiðingar.

4. **Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
   Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar /felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1, nr. 1:**
Við hesi lógarbroyting kann ein likamligur persónur fáa eina gávu upp á í mesta lagi kr. 5.000 árliga, frá øðrum likamligum persóni, uttan at rinda skatt. Gávumóttakarin (hin skattskyldugi) kann fáa gávur frá fleiri ymiskum gevarum, soleiðis at samlaða upphæddin fer upp um kr. 5.000. Tó verður eitt mark sett soleiðis, at sami gávumóttakari í mesta lagi kann taka ímóti kr. 30.000 árliga uttan at rinda skatt av upphæddini. Skattur verður tí einans goldin av upphæddini, sum er omanfyri kr. 30.000.

Henda lógarbroyting ávirkar ikki ásetingarnar í t.d. § 29, nr. 3 og nr. 17. Hesar eru framvegis galdandi.

**Til § 2:**
Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Á Løgtingi, 19. september 2018**

Joen Magnus Rasmussen